# Hotellið mitt í býnum

Væl fyri og mitt í blómandi høvuðsstaðnum í Íslandi, bjóðar Hotell Frón nútíðar kømur og alt tað sum tí vitjandi leingist eftir.

"The location was excellent. Also, the staff was very helpful during our stay!".

Soleiðis tók ein av gestunum, amerikumaðurin Richard úr Gig Harbour til, tá hann skuldi meta um hetta hotellið.

Hann er ikki einsamallur um hesa positivu metingina, tí miðalmetingin hjá gestum teirra er 8,1 á einum skala millum 1 og 10. Føroyingar hava eisini búð á hesum hotellinum, og fekk tað 7,5 í ummæli frá viðkomandi.

Tað er serliga staðsetingin ið dámar teimum vitjandi væl, men eisini reinhaldið fær eisini gott skoðsmál.

Eitt annað sum ger hetta hotellið so væl umtókt, er uttan iva møguleikin hjá fólki sjálvi at kóka sær ein drekkamunn: Fleiri av kømrunum hava nevniliga ein tekøk.

## Alt á einum staði

Fyri tey ið elska at vitja handlar, er Hotell Frón snøgt sagt staðið. Miðskeiðis í góðum shopping-øki, reisir hetta hotellið seg við tveimum bygningum á høvuðsgøtuni Laugavegur.

Tann ið hevur gist her, hevur eisini sannað tað litspælið sum sermerkir sethús og bygningar í Reykjavík.

Íslendski høvuðsstaðurin liggur á eini hálvoyggj, og hiðani av hotellinum hevur ein besta útsýnið yvir fjøllini og Atlantshavið. Av hotellinum er stuttu vegur til Tjóðleikhúsið, og eitt stórt úrval av matstovum, café'um, gallarí'um og søvnum.

Hotell Frón hevur nøkur sera góð tilboð til tann vitjandi, men megnar samstundis at hava rímiligar prísir og kann tryggja eitt gott uppihald, m.a. við ókeypis alneti og eina matstovu við eini terassu í stovuhæddini, har tú fært ein morgunmat við altjóða dámi.

Næsti granni hjá hotellinum er mexikanska Santa Maria-matstovan, og tað er eisini her at morgunmaturin verður etin. Við ektaðari mexikanskari innrætting, hevur Santa Maria rættar mexikanskar rættir á matarskrá síni.

Mánadagin millum klokkan 11 og 12 hevur tú møguleika at vinna eina ferð til Reykjavíkar og eitt uppihald júst á hesum hotellinum.























**MITT Í**

*Hotel Frón liggur mitt í "tí heila" og ger sítt til, at tey ið gista her skulu fáa so góða tænastu sum tilber*


